# Brúkið tilfeingisgjald til eftirløn til sjófólk

**MAKRELUR** Kári P. Højgaard, løgtingsmaður hjá Sjálvstýrisflokkinum, heldur, at skal tilfeingisgjald leggjast á fyri at fiska makrel, eigur gjaldið at koma fiskimonnum sjálvum til góðar. – Fiskimenn eru millum tey í samfelagnum, sum eru ringast fyri við eftirløn, sigur hann

Vilmund Jacobsen



*- Vit mugu ásanna, at veiðan eftir makreli í løtuni er óskipað, og tað eru so sanniliga ikki bara Føroyar, sum eiga at bera ábyrgdina av hesum, men so avgjørt bæði Noreg, ES og Ísland, sigur Kári P. Højgaard, løgtingsmaður*

Hann er umboð hjá Sjálvstýrisflokkinum í vinnunevnd løgtingsins og hevur hugsað nógv um alt tosið, sum í seinstuni hevur verið um at leggja tilfeingisgjald á veiði eftir makreli.

- Nú mugu vit ikki gloyma, at tað, sum Føroyar í fjør og aftur í ár fara at býta sær sjálvum av makreli útyvir tað, sum var avtalað í strandalandaavtaluni, er líka sum "ekstraordinert", sum Kári P. Højgaard, løgtingsmaður, tekur til.

Hann vísir á, at eingin trygd er fyri, at hetta verður okkara býtispartur frameftir, men sjálvsagt eiga Føroyar at leggja stóran dent á at fáa mest møguligt av heildarkvotuni av makreli í sín part.

- Hinvegin mugu vit ásanna, at veiðan eftir makreli í løtuni er óskipað, og tað eru so sanniliga ikki bara Føroyar, sum eiga at bera ábyrgdina av hesum, men so avgjørt bæði Noreg, ES og Ísland.

### Styrkja pensjónina

Løgtingsmaðurin hjá Sjálvstýrisflokkinum og umboð floksins í vinnunevnd løgtingsins heldur, at ein partur av tí, sum henda økta kvotan av makereli kann geva, eigur at fella aftur til fiskimannin.

Men hvussu hugsar løgtingsmaðurin sær so, at hetta kann gerast.

- Eg haldi, at skulu vit leggja tilfeingisavgjald á makrel í hesum "ekstraordineru tíðum" við makreli, so eigur ágóðin at koma fiskimonnum sjálvum til góðar.

Kári P. Højgaard vísir á, at fiskimenn eru millum tey, sum eru ringast tryggjaðir á pensjónsøkinum.

- Pensjónin hjá fiskimonnum er lutfalsliga lítil, og tá havt verður í huga, at øll innan langt um líður skulu brúka 15% av inntøkuni til egna pensjón, havi eg skilt, at hjá fiskimonnum er langt á mál.

Løgtingsmanninum líkar tí tankan, at ávísur prosentpartur av virðinum fyri makrelin kundi farið í ein pensjónsgrunn til fiskimenn, soleiðis at teirra grundarlag undir egnari pensjónsskipan varð styrkt.

- Vit kunnu ikki rokna við, at tað, sum hendi í fjør og tað, sum fer at henda í ár, har Føroyar sjálvar áseta sær egna makrelkvotu, fer at vara í allar ævir. Um makrelveiðan hjá skipunum í føroyskum sjógvi í ár verður góð, hevði eitt ávíst prosentgjald gjørt mun og hevði soleiðis lyft eitt lítið sindur undir pensjónirnar hjá fiskimonnum, sigur Kári P. Højgaard.

Hann heldur, at eitt tal sum 10% av søluvirðinum kundi verið umhugsað, men leggur aftrat, at støðan hjá honum til slíkt avgjald er tengt at, hvar ágóðin hevði verið brúktur.

- Hinvegin vænti eg, at hetta høvdu verið eingangstøl, sum komu í grunnin, eitt ár í senn, tí eg ímyndi mær, at strandalondini í nærmastu framtíð kortini fara at semjast um býtið av heildarkvotuni av makreli, sum sjálvandi er best fyri umsitingina av hesum tilfeingi, sigur Kári P. Højgaard, løgtingsmaður og limur í vinnunevnd løgtingsins.

vilmund@sosialurin.fo

> **Vit kunnu ikki rokna við, at tað, sum hendi í fjør og tað, sum fer at vara í allar ævir**
>
> KÁRI P. HØJGAARD

> **Pensjónin hjá fiskimonnum er lutfalsliga lítil og langt er á mál hjá teimum á pensjónsøkinum**
>
> KÁRI P. HØJGAARD



*- Skulu vit leggja tilfeingisavgjald á makrel í hesum "ekstraordineru tíðum" við makreli, eigur ágóðin at koma fiskimonnum sjálvum til góðar, heldur Kári P. Højgaard, løgtingsmaður*
Mynd: Karstin Vang